## Nakrir týdningarmiklir spurningar á arbeiðsplássum

Tá ið tú skalt kappast á framtíðarinnar harða marknaði er neyðugt við góðum svarum upp á nógvar spurningar. Nakrir av hesum prenta vit niðanfyri:

Hvør kunnleiki og hugburður er neyðugur hjá tínum starvsfólkum fyri at kunna náa dygdargóðar og effektivar broytingar?

Hví er so lítil nýskapan á so mongum arbeiðsplássum?

Í dag røkkur tú bert 30 prosentum av teimum broytingum, tú setir tær fyri. Hvat leiðaraamboð finst, sum ger, at tú røkkur einum nøktandi tali av málum?

Hvørja prioritering føla starvsfólkini, at hesi týdningarmiklu viðurskifti hava á arbeiðsplássunum, og í hvønn mun halda tey, at hesi eru uppfylt.

Hesir spurningar eru millum teir, sum FloodRocks setir á skeiðnum, sum verður í Kelduni í Skálafirði mánadagin komandi.

# Leiðsluskeið verður í Kelduni í Skálafirði

**Á skeiðnum fer Morten Selven, sum er dagligur leiðari á FloodRocks AS í Noregi at greiða frá altjóða gransking, eins og hann fer at greiða frá teimum royndum, sum felag hansara hevur gjørt sær til tess at menna fyritøkur til harða altjóða kapping. Hann fer eisini at greiða frá úrslitum, sum rokkin eru í hesum sambandi**

SKEIÐVIRKSEMI
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



*Morten Selven, dagligur leiðari á FloodRocks og Marie-Louise Westholm, ráðgevi, fara at greiða frá, hvussu stór mál kunnu røkkast eftir lutfalsliga stuttari tíð, um farið verður miðvíst til verka við n‡skapan og broyttum hugburði. Skeiðið verður í Kelduni í Skálafirði mánadagin*

Mánadagin komandi heldur norska ráðgevingarfelagið, FloodRocks AS, skeið í Kelduni í Skálafirði, har høvið er hjá leiðarum á arbeiðsplássum og øðrum at kunna seg um ymiskar hættir til nýskapan og betri hugburð, sum kunnu fremja dygargóðar og effektivar broytingar.

### Gransking og royndir

Dagligur leiðari á FloodRocks er Morten Selven, sum er fyrrverandi flogskipari.

Seinastu tíggju árini hevur hann arbeitt á altjóða stigi sum virkisráðgevi, har dentur er lagdur á at vinna virkjum og fyritøkum størri kappingarevni við broytingum og nýskapanartiltøkum.

Á skeiðnum í Kelduni fer Morten at greiða frá altjóða gransking á økinum, eins og hann fer at greiða frá teimum royndum, sum felag hansara hevur gjørt sær – og teimum úrslitum, sum rokkin eru í hesum sambandi.

### Stór mál

Morten Selven fer at greiða frá, hvussu stór mál kunnu røkkast eftir lutfalsliga stuttari tíð, um farið verður miðvíst til verka.

Við á ferðini í Føroyum verður eisini Marie-Louise Westholm, ið starvast hjá norska felagnum sum ráðgevi á økinum.

Marie-Louise er sálarfrøðingur og hevur eitt nú starvast sum leiðari og virkisráðgevi.

Skeiðið í Kelduni verður mánadagin komandi. Tað byrjar klokkan 13.30 og er liðugt klokkan 16.30.

# Gáttin í Kelduni eigur ikki at verða ov høg

**Pauli Høj, samkomuleiðari í Kelduni í Skálafirði, heldur ikki, at gáttin at koma inn í Kelduna eigur at vera so høg, at eitt nú vinnulív og forrætning ikki eisini skulu kunna gera nýtslu av vælegnaðu hølunum**

SKEIÐVIRKSEMI
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*




*- Tá ið FaroeExpo var í Eysturoy, vóru eisini tiltøk í Kelduni, og eg havi skilt, at fyriskipararnir vóru væl nøgdir við umstøðurnar, sigur Pauli Høj, samkomuleiðari*

Pauli Høj, sum er samkomuleiðari í Kelduni í Skálafirði og sum eisini er høvuðsábyrgdari av bygninginum, sigur, at hann hevur sjálvur luttikið á einum av skeiðunum, sum FloodRocks AS í Noregi hevur hildið í Føroyum. Hetta skeiðið var á Hotel Føroyum og snúði seg í fyrsta lagi um leiðsluviðurskifti.

### Størri vitan

- Nú eri eg samkomuleiðari, men nógv av teimum prinsippum, sum vóru frammi á skeiðnum, eru generell og geva tær nakað at hugsa um. Men eg vil siga, at skeiðið ivaleyst var uppaftur meira gevandi fyri vinnulívsfólk og tey, sum leiða arbeiðspláss av ymiskum slagi.

Pauli sigur, at skeiðið á Hotel Føroyum í størri mun var fyri leiðandi fólk innan vinnulívið enn seg sum samkomuleiðara.

- Men skeiðið hjá FloodRocks gav tær samstundis eina størri vitan um vinnuna og var eitt høvi at læra betur at skilja teir spurningar, sum leiðarar á ymiskan hátt hava at dragast við.

Hann vísir á, at umframt at FloodRocks skipar fyri leiðaraskeiðum, bjóðar ráðgevingarfelagið sær eisini at vitja arbeiðspláss, har bæði leiðsla og arbeiðsfólk í felag kunnu fáa nakað burtur úr, soleiðis at tey náa hægri málum.

### Keldan opin

Pauli sigur, at tey, sum standa aftanfyri Kelduna í Skálafirði, einki hava ímóti at leiga húsið út til ráðstevnur, skeiðir og annað, sum vinnulívið og handilslívið annars standa aftanfyri.

- Tá ið FaroeExpo var í Eysturoy, vóru eisini tiltøk í Kelduni, og eg havi skilt, at fyriskipararnir vóru væl nøgdir við umstøðurnar.

Hann sigur, at fyrispurningar eru um at leiga hølini, og Keldan er sum nevnt opin fyri øllum tí vanliga – ella dagliga, sum hann tekur til.

- Eg haldi ikki, at gáttin at koma inn í Kelduna eigur at vera so høg, at eitt nú vinnulív og forrætning ikki eisini skulu kunna gera nýtslu av vælegnaðu hølunum. Hinvegin hava vit ikki viljað leigað hølini út til tilvildarligar konsertir, sigur Pauli Høj, sum fegnast um, at skeiðið hjá FloodRocks AS í Noregi nú verður hildið í Kelduni.

Í Kelduni í Skálafirði er pláss fyri umleið 800-900 fólkum.